LM-011/2025

Fylgiskjal 5.

Gunnvá Ellendersen

Fra: Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>
Sendt: 8. august 2025 13:47
Til: Elsa Magnussen; Løgmálaráðið
Cc: Steinar Eirikstoft; Tummas í Garði; Gunnvá Guttesen
Emne: SV: Til ummælis: uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión

Til Løgmálaráðið

Landssjúkrahúsið hevur umrøtt uppskotið til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión, og tekur undir við viðmerkingunum, ið Klaksvíkar Sjúkrahús hevur sent tykkum.
Umframt hetta heldur Landssjúkrahúsið, at eitt argument fyri hví umhugsunartíð er sett til fólk júst millum 25 - 30 ár er mangulfult í uppskotinum.
Snýr tað seg um burðarførið hjá fólki, so kundi hetta verið eitt argument, men tá skuldi aldursmarkið heldur samsvara við nær flest byrja og steðga við at fáa børn.
Snýr tað seg hinvegin um, at ung fólk ikki skilja hvussu umfatandi og endaligt eitt inntriv sum sterilisatión og kastratión er, so eigur tað at vera aldursmark at øll undir 30 ár skulu hava eina umhugsunartíð uppá 6 mánaðir, umframt innihaldsríka kunning um inntrivið.

Vinarliga

Úlvhild Teitsdóttir
Samskiftisfulltrúi, Stjórnarskrivstovan
Tel. +298 304592

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49 · FO-100 Tórshavn
Tel. +298 304500 · www.sjukrahus.fo

Fra: Elsa Magnussen <Elsam@lmr.fo>
Sendt: týsdagur, 1. juli 2025 14:36
Til: Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Barna- og útbúgvingarmálaráðið <bumr@bumr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; Føroya Kærustovnur <fks@fks.fo>; Ella Larsen <ellla@ls.fo>; Landssjúkrahúsið <ls@ls.fo>; politi@politi.fo; srfelag@gmail.com; amnesty@amnesty.fo; megd@megd.fo; mail@psykolog.fo; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Javnstøðunevndin <javnstoda@javnstoda.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Etiskaradid <er@er.fo>; marjusdam@gmail.com; Jan Rasmussen <JanRa@ls.fo>; ljm.foroya@gmail.com; Gigni <gigni@gigni.fo>; mammuhjalpin@mammuhjalpin.fo; provita@provita.fo; frittvalfo@gmail.com; foe@stps.dk
Emne: Til ummælis: uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión

Góðan dag

Við hesum verður uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión sent tykkum til ummælis.

Sterilisatión, sum ikki krevur loyvi

Skotið verður upp, at persónar, sum hava fylt 25 ár, og sum eru førir fyri at skilja týdningin av inntrivinum, hava rætt til at verða steriliseraðir. Tað er tí ikki neyðugt við loyvi fyri at verða steriliseraður. Harafturat verður skotið upp at áseta eina kravda umhugsunartíð fyri fólk millum 25 og 30 ár, soleiðis at hesi ikki kunnu verða steriliseraði fyrr enn 6 mánaðir eftir, at viðgerðartilboð er givið.

Sterilisatión, sum krevur loyvi
Fólk, sum eru yngri enn 25 ár, og fólk, sum orsakað av t.d. menningartarni ella sálarsjúku, ikki eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kunnu undir nærri ásettum treytum verða steriliseraði við loyvi frá einum samráði.

Samráðið verður mannað við einum løgfrøðingi, einum serlækna í psykiatri og einum sosialráðgeva.

Loyvi kann verða givið, um týðandi vandi er fyri arvaligum sjúkum, um umsøkjarin og makin ikki eru før fyri at taka sær av einum barni, um týðandi vandi er fyri, at umsøkjarin ikki megnar at fullføra viðgongutíðina, ella at eitt barn ikki verður lívført. Somuleiðis verður skotið upp, at loyvi kann verða givið til sterilisatión osakað av sosialum umstøðum.

Avgerðir hjá samráðnum kunnu kærast til Føroya Kærustovn.

Ráðgeving og stuðulssamrøða
Skotið verður upp, at fólk, sum ikki eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, skulu hava í boði ráðgeving og stuðulssamrøðu frá seksualvegleiðara ella sosialráðgeva.

Endamálið er at stuðla viðkomandi í at taka eina avgerð á væl upplýstum grundarlagi og at stuðla viðkomandi í at geva kunnað samtykki.

Eingin heimild er fyri at fremja eina sterilisatión undir tvingsli.

Kastratión
Skotið verður upp, at kastratión bara kann verða framd við loyvi frá samráðnum. Loyvi verður bara givið, um kynstráanin setir viðkomandi í vanda fyri at fremja brotsgerðir ella førir við sær álvarsligar sálarligar sjúkur ella sosiala skerjan. Ein frágreiðing frá Rættarlæknaráðnum skal fyriliggja.

Skotið upp, at loyvi ikki kann verða givið til kastratión av persóni undir 25 ár. Hetta broytir galdandi lóg soleiðis, at aldursmarkið verður broytt frá at vera 21 ár til at vera 25 ár.

Sambært galdandi lóg er heimild fyri at geva loyvi til kastratión av persónum undir 18 ár, um heilt serligar orsøkir tala fyri tí. Skotið verður upp, at heimildin fyri at veita undantak, um heilt serligar orsøkir tala fyri tí, verður strikað.

Møguligar viðmerkingar kunnu sendast Løgmálaráðnum á teldupost lmr@lmr.fo í seinasta lagi fríggjadagin 8. august 2025.

Vinarliga / Kind regards

Elsa Magnussen
Fulltrúi / Head of Section
Mobile: +298 73 40 58
elsam@lmr.fo

LØGMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Justice

Løgmálaráðið
Gongin 7
Postrúm 377

FO-110 Tórshavn

+298 35 80 80
www.lmr.fo

FYRIVARNI:
Innihaldið í hesum telduposti er ætlað omanfyri nevnda móttakara, og kann innihalda upplýsingar veittar í trúnaði. Um tygum ikki eru rætti móttakarin, gera vit vart við, at tað ikki er loyvt at avdúka, margfalda, spjaða ella á annan hátt at nýta innihaldið. Um tygum, orsakað av mistaki, hava móttikið henda teldupost, hóast hann ikki er ætlaður tygum, setið tygum vinarliga í samband við meg gjøgnum telefon ella við telduposti skjótast gjørligt. Hesin teldupostur myndar ikki nakað tilboð ella játtan av nakrari sáttmálabundnari avtalu. Slík tilboð ella játtanir mugu fráboðast í brævi ella øðrum skrivi.

CONFIDENTIALITY NOTICE:
The information contained in this email is intended for the named recipient only as the contents may be confidential. If you are not the intended recipient, we must inform you that you are not permitted to reveal, copy, distribute or otherwise use the contents. If you have received this email by mistake although it is not meant for you, please contact me by telephone or by email as soon as possible. This email does not represent any offer or acceptance of any contractual agreement. Notification of any such offer or acceptance must be given by letter or in other written format.